# Norðurlendsku OL-liðini

**Av teimum seks norðurlondunum, er Svøríki hitt sterkasta. Áhugavert verður at fylgja 13 ára gamla stórmeistaranum Magnus Carlsen, sum mannar 1. borð á norska OL-liðnum**

TALV
*Carl Eli N. Samuelsen*

Grannalond okkara hava, eins og vit, longu almannakunngjørt síni landslið, sum fara til talvolympiaduna á Mallorka í døgunum 14-31. oktobur. Okkara lið er nógv tað veikasta, um man tekur miðalratingina, meðan sviar eru eitt vet sterkari enn danir og norðmenn. Miðalratingin av liðunum er roknað útfrá fýra teimum ovastu umboðunum. Eykamennirnir eru ikki roknaðir við.

Sí liðmanningarnar aðrastaðni í blaðnum í dag.



*Hans Kristian Simonsen leikar á næsta borðinum hjá føroyska liðnum*

### Undurbarnið

Yngsti stórmeistari í heiminum í løtuni, Magnus Carlsen (2567), hevur fingið æruna at manna 1. borðið á norska OL-liðnum. Hóast hann hevur minni rating enn venjarin hjá sær, Simen Agdestein (2595), sum hevur 2. borð, hevur norska talvsambandið valt, helst við aksept frá Agdestein, at seta Magnus fremst. Ein sonn avbjóðing fyri norska undurbanrið, men hinvegin kann nærum einki yvirraska okkum meir viðvíkjandi Magnusi. Hann hevur seinastu árini fingið knasandi góð úrslit, sum hevur førkað ratingtal hansara ímóti 2600. Í vár hevði hann t.d. Kasparov í knøunum, men talvið endaði tó javnt.

Eins og á føroyska liðnum, eru trý avboð á danska landsliðnum: GM Curt Hansen, GM Lars Bo Hansen og GM Hendrik Danielsen. Danska liðið er annars mannað við júst teimum somu telvarunum sum fyri tveimum árum síðani í OL í Bled, Slovenia. Curt hevði styrkt væl um liðið, men eftirhondini munnu danir vera vanir við at klára seg uttan Curt, sum oftani hevur meldað avboð. Í 2002 høvdu russar Garry Kasparov á liðnum. Ikki er greitt um hann hesaferð verður trumfurin mikli. Greitt er í øllum førum, at Viswanathan Anand verður 1. borð hjá India.

### Internettelving

Síðani ár 2000 hevur ein serlig norðurlandameistarakapping fyri lið verið telvað á internetinum. Meistaraliðini í hvørjum landi fáa á hvørjum ári møguleikan at luttaka. Klaksvíkingar vunnu FM í ár og fingu teir tí atgongd.

Mannagongdin er tann, at hvørt lið telvar á servaranum hjá vælkenda Internet Chess Club (www.chessclub.com). Øll seks liðini sita í hvør sínum landi og telva samstundis. Tíðin er 20 min. + 5 sek pr. leik.

Klaksvíkingar endaðu aftastir við 6 stig, meðan Hellir úr Íslandi vunnu við 20,5 stigum. Á www.kt-chess.com er endaliga støðan og einkultúrslitini hjá KTF at finna. Talvið hesa vikuna er úr kappingini.

### Norðurlondini

| | | |
|---|---|---|
| **Svøríki** | | **(2567)** |
| 1 | GM Evgenij Agrest | 2602 |
| 2 | GM Ulf Andersson | 2580 |
| 3 | GM Tiger H. Persson | 2529 |
| 4 | IM Johan Hellsten Østenstad | 2557 |
| 5 | IM Emanuel Berg | 2510 |
| 6 | GM Stellan Brynell | 2408 |
| **Danmark** | | **(2553)** |
| 1 | GM Peter H. Nielsen | 2652 |
| 2 | GM Sune B. Hansen | 2552 |
| 3 | IM Davor Palo | 2513 |
| 4 | GM Lars Schandorff | 2496 |
| 5 | IM Nicolai Pedersen | 2471 |
| 6 | IM Erling Mortensen | 2455 |
| **Noreg** | | **(2546)** |
| 1 | GM Magnus Carlsen | 2567 |
| 2 | GM Sigmund Agdestein | 2595 |
| 3 | GM L. E. Johannesen | 2538 |
| 4 | GM Berge Østenstad | 2482 |
| 5 | IM Kjetil A. Lie | 2459 |
| 6 | IM Frode Elsness | 2408 |
| **Ísland** | | **(2493)** |
| 1 | GM Hannes Stefansson | 2549 |
| 2 | GM Helgi Ólafsson | 2531 |
| 3 | GM Þróstur Þórhallsson | 2460 |
| 4 | IM Bragi Þórfinsson | 2431 |
| 5 | IM Arner E. Gunnarsson | 2418 |
| 6 | IM Stefan Kristjansson | 2410 |
| **Finnland** | | **(2458)** |
| 1 | GM Tomi Nubäck | 2562 |
| 2 | IM Tapani Sammalv. | 2445 |
| 3 | IM Mika Karttunen | 2414 |
| 4 | FM Heikki Lehtinen | 2410 |
| 5 | FM Miikka M. Uuro | 2397 |
| 6 | FM Riku Molander | 2345 |
| **Føroyar** | | **(2280)** |
| 1 | Martin Poulsen | 2319 |
| 2 | Hans Kr. Simonsen | 2290 |
| 3 | Olaf Berg | 2199 |
| 4 | IM John Rødgaard | 2310 |
| 5 | Eyðun Nolsøe | 2212 |
| 6 | Carl Eli N. Samuelsen | 2225 |








# Heidi í hylinum

*So er spurningurin, hvørt talan eisini verður um fleiri heiðursmerki hjá Heidi Andreasen hesaferð*



Heidi Andreasen svam sunnumorguin sína fyrstu kapping á Paraolympisku leikunum

Hetta var í kappinginini 100 m firvald, sum tó ikki er ein av greinunum, har føroyski gullfiskurin roknar við nøkrum heiðursmerkjum.

Heidi svam teinin í tíðini, 1.31.11, og var hetta nóg mikið til eitt 9. pláss.

Mánadagin stendur kappingin í 100 metra frí á skránni, og her eru vónirnar hjá Heidi øðrvísi betri. Av listanum yvir tilmeldingartíðir framgongur, at Heidi hevur næst bestu tíðina av svimjarunum í hesi greinini, og so er at vóna, at hon í øllum førum livur upp til hetta.

Innleiðandi umførini í tí kappingini vóru á skránni mánamorgunin ,og her eydnaðist Heidi at svimja seg í finaluna. Um kvøldið - eftir evstamark okkaravar so sjálv finalan á skránni.

**-jm**

# Fekk hornaflagg í eyga

Jann Ingi Petersen noyðist at halda frí frá fótbólti komandi tíggju dagarnar Heimasíðan hjá Fremad Amager skrivar, at talan var um eitt heldur margháttligt óhapp á venjingarvøllinum hjá felagnum, sum førdi til, at føroyski miðvallarin nú ikki er tøkur.

Undir venjing fekk Jann Ingi onkursvegna eitt hornaflagg í eyga, og alt fyri eitt varð hann koyrdur á skaðastovuna.

Tíbetur er talan tó ikki um nakað álvarsligt mein. Sambært heimasíðuni er talan um nakað av bløðing í eyganum, men væntandi verður Jann Ingi aftur tøkur um einar 10 dagar.

**-jm**



# Talvið hesa vikuna

Finnbjørn Vang (2042) — Erik Sobjerg (2257)
Nordic Internet Club Cup. 11.09.2004

1.e4 e5 2.Rif3 Ric6 3.Bc4 Rif6 4.Rig5 (Hvítur vil komplisera talvið. Nakað sum klaksvíkingurin eisini trívist best í) 4...d5 5.exd5 Rid4 6.c3 b5 7.Bf1 Rixd5 8.Rie4 Fh4 9.Rig3 Bg4 (Svartur letur mann fyri álop. Hvítur skal nú ansa sær, men megnar hann at koma livandi burturúr meldrinum, ja so er materiali í yvirskot) 10.f3 Bd6 (Danin vil útnytta passivu hvítu støðuna og telvar sera djarvt) 11.cxd4 e4 12.Bxb5+ Kd8 13.Kf2 f5 14.Fb3! Rif6 15.fxg4 f4 16.Kg1 Rb8 17.h3 (Ric3 hevði verið betur) 17...f3 18.Fe3 Fxg3? (Rxb5 er væl sterkari) 19.Bf1 Rf8 20.Ff2 (Svartur hótti Rixg4 og síðani f2+) 20...fxg2 21.Fxg2 Fe1 22.Ric3 Rb4 23.b3 e3 24.Ba3



Støðumynd eftir 24.Ba3

24...exd2 (Teir hava ivaleyst báðir verið í tíðarneyð her. Í øllum førum flyta teir ikki upplagdu leikirnar. T.d. eigur svartur einfalt at taka rókin á a1, sum minst gevur javnt spæl) 25.Rd1 Rid7 (25...Rixg4! 26.hxg4 Fe3+ og mát verður. Rixg4 hevði vunnið talvið fyri svartan, men tíbetur fyri Finnbjørn leikti danin skeivt í tíðarneyðini) 26.Rxd2 Rxd4 27.Fa8+ Ke7 28.Bxd6+ Kxd6 (28...Rxd6 tapur eftir 29.Re2+) 29.Rxd4+ Kc5 30.Fd5+ Kb6 31.Fb5# Eitt sera vilt og undirhaldandi talv. 1—0


